## Føroyingar hittast í Aalborg

8. februar 2008 verður hugnakvøld fyri ”eldri” í føroyingafelagnum í Aalborg.
Tað eru nøkur av teimum “eldru” ið hava tikið stig til tiltakið. Við “eldri” sigst at meinast við 40+. Tiltakið sær út til at hava fingið stóra undirtøku, og verða tey eini 40 ið fara til borðs, tá borðreitt verður við knettum og tí sum har hoyrir til. Á vitjan kemur Hans og Inga Tórgarð úr Hirtsals, og við teimum verður farið uppá gólv. Hugnakvøldið verður í hølum felagsins á CH Rydersvej 24, 9210 Aalborg SØ. Freistin at tekna seg er úti, men áhugaði kunnu venda sær til HYPERLINK ”mailto:nevndin@alaborg.dk” nevndin@alaborg.dk ella á tlf. til Litu 98152960 - Hjørleif 98151610 og Sonju 98949463. Føroyingafelagið í Aalborg eitur Álaborg.

## Marknaðarføra tónleik fyrst og fremst

Í seinastu viku sendi SamVit eitt tíðindaskriv út vegna fyrireikararnar av ymiskum tiltøkum til frama fyri føroyskan tónleik. Í tíðindaskrivinum vóru fleiri smærri tíðindastubbar um tey aktuellu tiltøkini, har ein av tíðindastubbunum hevði yvirskriftina: ”Tónleikur selur fisk”. Henda orðingin sipaði sjálvandi ikki til endamálið við øllum tiltøkunum (so sum tað er blivið tulkað av onkrum), men var meint sum ein staðfesting av, at tónleikur kann vera við til at branda Føroyar – og tí óbeinleiðis eisini kann vera við til at selja fisk.

# Klaksvíkar Kommuna stovnar mentanargrunn

**Mentanarleiðarin í Klaksvíkar Kommunu vónar, at nýstovnaði 100 ára grunnurin er komin fyri at vera. Fyribils veitir grunnurin tó bert stuðul til mentanartiltøk í 2008**

MENTAN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nú ber til at søkja peningaligan stuðul úr nýstovnaða 100 ára grunninum hjá Klaksvíkar Kommunu til mentanartiltøk av ymsum slag. Treytin er tó, at verkætlanin verður veruleiki og víst fram í 2008.

### Heldur vónandi fram

Nýggi grunnurin er stovnaður í sambandi við at Klaksvíkar Kommuna fyllir 100 ár í ár. Í fyrsta umfari letur grunnurin tí bert stuðul til mentanarlig tiltøk, sum onkursvegna verða partur av hátíðarhaldinum, tað vil siga, at tey skulu frumframvísast í Klaksvík í 2008. Ongin forðing er tó fyri, at verkið verður víst fram aðrastaðni í landinum eisini.

Tað var Dávur Winther, leiðari á mentanardeildini hjá Klaksvíkar Kommunu, ið legði uppskotið um 100 ára grunnin fyri Mentanarnevndina í sambandi við viðgerð av fíggjaætlanini hjá kommununi fyri 2008. Nevndin tók undir við uppskotinum, sum eisini vann frama millum býráðslimir.

Nú vónar Dávur Winther so, at virksemið hjá grunninum kann halda fram í onkrum líki framyvir.

- Eg vóni og vænti, at grunnurin kann halda fram, og at upphæddirnar, ið verða latnar, verða líka stórar, sum nú, sigur Dávur Winther.

Til tiltøk í 2008 letur grunnurin eina upphædd á 100.000 kr, tvær á 50.000 kr og tvær á 25.000 kr.

– Vit hava lagt okkum eftir at lata fáar men lutfallsliga stórar upphæddir, sum gera mun, heldur enn at tæga tær sundur í smærri upphæddir, sigur Dávur Winther, sum vónar, at stóru upphæddirnar fara at stimbra fólk til at koma við sínum bestu hugskotum.

Í nevndini, ið skal viðgera innkomnu umsóknirnar um stuðul, sita borgarstjórin, Steinbjørn. O. Jacobsen, formaðurin í mentanarnevndini, leiðarin á mentanardeildini, Dávur Winther umframt eitt mentafólk í býnum, sum ikki er valt enn.

### Stórt hátíðarhald

Sjálvt 100 ára hátíðarhaldið hjá kommununi fer av bakkastokki í august mánað, tá ein røð av tiltøkum fara at seta dám á býin.

Ásannandi at eitt slíkt hátíðarhald verður sera kostnaðarmikið, skjeyt mentanardeildin upp, at eitt prosent av fíggjarætlanini hjá kommununi varð sett av til hátíðarhaldið, tað vil siga á leið 1,4 milliónir. Hetta eydnaðist tó ikki, og sum er, verða einar 600.000 krónur at ráða yvir til hátíðarhaldið.

Ein avleiðing av skerdu játtanini er, at onkrar sjónleika- og tónleikaverkætlanir, sum eru í umbúnað, ikki fá allan tann peningaliga stuðul, ið var ætlaður teimum. Men eins og øll onnur, hava hesi nú eisini høvi at søkja stuðul úr 100 ára grunninum.

Freistin at søkja stuðul úr grunninum er 15. mars.



*Jastrid Gulaksen, grafikari, hevur gjørt búmerkið hjá 100 ára grunninum hjá Klaksvíkar Kommunu*

# Hans Pauli Olsen ger standmynd til Klaksvík

**Stór standmynd eftir listamannin Hans Paula Olsen verður reist við Gamla Kirkjugarð í Klaksvík í sambandi við 100 ára haldið hjá kommununi**

KLAKSVÍK

*Anna V. Ellingsgaard*

Fyrr í vikuni frættist, at ein standmynd, ið verður gjørd í sambandi við 100 ára hátíðarhaldið hjá Klaksvíkar Kommunu fór at kosta tað dupulta av teimum 500.000 kr, sum vóru settar av til endamálið.

Á býráðsfundi í Klaksvík týskvøldið samtykti eitt einmælt býráð kortini at seta neyðuga peningin, eina millión krónur, av til verkætlanina.

### Ikki óvæntað

– Vit hava allatíðina vitað, at verkætlanin fór at kosta meir, enn tær 500.000, sum upprunaliga vórðu settar av, so tað er ikki nakað, ið er komið óvart á. Stemningurin á býráðsfundinum var, at tað kortini má fáast at bera til at gera hesa verkætlanina til veruleika, sigur mentanarleiðarin í Klaksvíkar Kommununu, Dávur Winther, sum hevur sitið í hugskotsbólkinum saman við listamonnunum Edward Fuglø, Archibald Black, Hans Paula Olsen og býargartnaranum, Hans Hjalta Skaale.



*Listamaðurin Hans Pauli Olsen er í fer við at gera eina standmynd í sambandi við at Klaksvíkar Kommuna fyllir 100 ár. Standmyndin skal standa við Gamla Kirkjugarð*

Dávur Winther leggur afturat, at í løtuni verður roynt at finna vantandi pengingin á onkrari aðrari konto. Eisini verður arbeitt við at fáa onnur at lata nakað av peningaligum stuðli.

### Inngongd til Klaksvík

Tað er listamaðurin, Hans Pauli Olsen, ið skal gera standmyndina, ið kemur at standa við Gamla Kirkjugarð í Klaksvík.

Fleiri hugskot til standmyndina hava verið frammi, men hugskotsbólkurin metir tað, ið liggur á borðinum nú, vera tað mest áhugaverda.

– Standmyndin ímyndar tvær oyggjar, ið daga upp úr havinum og standa og tosa saman. Myndin er nonfigurativ og kann tulkast á ymsar mátar. Kanska eru hetta tvær norðoyggjar, sum standa og tosa ella norðoyggjar, sum standa og tosa við meginlandið, sigur Dávur Wither, sum kortini ikki kann avdúka nakra mynd av standmyndini enn.

Hann kann tó siga so mikið sum, at standmyndin verður rættiliga stór, og at til ber at ganga ígjøgnum ella inn undir hana. Á tann hátt kann hon eisini ímynda bæði eina inngongd til Klaksvík og at býurin letur dyrnar upp út í altjóða heimin.

Standmyndin hjá Hans Paula Olsen verður avdúkað í august mánað, tá stóra 100 ára hátíðarhaldið hjá Klaksvíkar Kommunu fer av bakkastokki.